# Bilur út av vegnum



savnsmynd

Sunnudagin fór ein bilur út av vegnum norðan fyri Kollfjarðatunnilin, men tey trý eldru fólkini í bilinum sótu í trygdarbelti og sluppu púra snikkaleys.

Løgreglan hevur um vikuskiftið fingið heilar 18 fráboðanir um ferðsluóhapp, men í ongum føri var talan um fólkaskaða.

Álvarsligasta hendingin fór fram í gjár, tá ein bilur fór út av vegnum norðan fyri Kollfjarðatunnilin. Bilurin bóltaði fleiri ferðir runt, men tey trý eldru fólkini sótu øll í trygdarbelti, og tey megnaðu sjálvi at ganga niðan á vegin aftur.

Annars er herverk gjørt á ein bil hjá Sosialinum, har forrúturin er brotin inn og bugla gjørd í bakhurðina.

Eisini er ein rútur á Hvonn brotin.

Ein onnur hending, sum nærmast má kallast skemtilig var, tá nakrir ungir menn vóru farnir í býin við bili og »privatsjaføri«. Teir parkeraðu bilin, og tá bilførarin seinni skuldi inn í bilin aftur, hevði hann læst lykilin inni. Helt hann. Hann gjørdi tí ikki mætari enn at bróta síðurútin fyri at sleppa inn í bilin. Tað visti seg so bara, at hann var farin inn í skeivan bil.

# Felags handverksmeistarafelag í Suðuroy

Tað hava higartil verið tvey lokalfeløg í suðuroynni, Vágs og Tvøroyrar handverksmeistarafeløg, men seinnu árini hevur einki virksemi verið í feløgunum.

Tí tóku handverksmeistarar í oynni hava stig til at stovna eitt felags lokalfelag fyri alla Suðuroynna, og á fundinum í seinastu viku nvar góð undirtøka fyri ætlanini.

Í nevndina í nýggja felagnum eru valdir Mortan Mortensen, formaður, Júst Johannesen, næstformaður, Gudmund Larsen, skrivari, Hans Olaf Johannesen og Andrias Holm

Nýggjar nevndir vórðu eisini valdar í hesi feløgini við tí endamáli at fyrireika uppskot til ein komandi eykaaðalfund um avtøku av feløgunum.



savnsmynd

# Johan Dahl sær fram til samstarv við Hetland

**SAMSTARV – Tað er at fegnast um, at føroyskar fyritøkur hava fingið fótin fyri sesg í Hetlandi, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður**

Jan Müller

– Eg ynski hetlendska leiðaranum vælkomnan til Føroya í hesi vikuni og fara vit at umrøða framtíðar samvinnu sigur Johan Dahl, vinnumálaráðharri.

– Eg frøðist um, at tað hevur eydnast Articon at koma inn á hetlendska marknaðin sum byggifelag og tað hevur hepnast teimum at fáa sáttmála viðvíkjandi útbygging av havnini í Scalloway fyri 2 siffraða milliónaupphædd. Hetta er vónandi bert ein byrjan til framtíðar samstarv við hetlendingar innan byggivinnuna.

Hetta sigur Johan Dahl, vinnumálaráðharri. Somuleiðis fegnast hann um, at ein onnur føroysk fyritøka, Føroya Tele somuleiðis sum veitari av teletænastum hevur megnað at veita tænastu til oljupallar i bretska økinum og gassterminalbygging í Hetlandi og er tað hansara vón, at eisini Hetland fer at nýta gott av okkara vitan og førleikum innan telesamskifti við at samstarva við Føroya Tele i komandi tíðum.

– Vit hava góðar førleikar innan onnur øki, sum vit eisini eiga at bjóða fram t.d KT, ráðgevingarvinnu, arkitektur, alivinnu osfr. Vit eiga at viðvirka til, at hetta samstarv mennist, soleiðis at vit eisini innan onnur øki i framtíðini koma at samstarva.

Johan Dahl sær eisini fram til vitjanina hjá formanninum í Hetlendska Oyggjaráðnum, Sandy Cluness. Hann kemur til Føroya í hesi vikuni at hitta umboð fyri bæði vinnulív og myndugleikar.

## Kolvetni

Í samrøðu við Sosialin í dag rør Sandy Cluness framundir meiri samstarv á eitt nú oljuøkinum. Johan Dahl tekur fult undir við hesum.

– Tað er nærliggjandi at hugsa, at tá kolvetni í rakstrarverdugum mongdum verður funnið í føroyskum øki, so kann roknast við, at eyguni verða vend mótvegis Hetlandi, ið hevur vælútbygdan infrastruktur til at taka ímóti og víðariføra olju og gass, sum eg skilji Sandy Cluness løgmaður eisini nevnir í samrøðu við Sosialin.

– Tað eru stórar útbyggingar, ið liggja fyri framman í Hetlandi viðvíkjandi virksemi innan oljuvinnuna og her eiga vit eisini at bjóða okkara arbeiðsmegi og vitan fram. Vit hava jú fleiri hundrað handverkarar av ymsum slag arbeiðandi í t.d. Noregi við olju -og gassútbyggingum, ið fara fram har, so hví ikki eisini bjóða seg fram í Hetlandi spyr landsstýrismaðurin.

## Elveiting/Orka

Johan Dahl vísir á, at hetlendingar arbeiða eisini við at gera eina stóra vindmylnupark og verkætlan at leggja el-kaðal til meginlandið og er henda gongdin sera áhugaverd fyri Føroyar eisini, og tí er Jarðfeingi í løtuni við at kanna møguleikan hjá okkum at gera eina vindmylnupark og kaðalsamband til meginalandið, so føroyingar eru sera áhugaðir at hoyra um hesa ætlan frá hetlendingum, nú teir vitja í Føroyum.

Johan Dahl sigur, at tað er ætlan hansara, ið eisini varir av elveiting og Anniku Olsen, ið varar av orkupolitikkinum, at fara at vitja feløg og støð í grannalondum, har varandi orkukeldur verða nýttar og mentar í nærmastu framtíð. Í tí høpi er eisini ætlanin at vitja í Hetlandi.

## Ferðavinna

Í ferðavinnu- og flogferðsluhøpi hevur verið samstarv við Hetland. Johan Dahl heldur tað er spell, at tað ikki hevur hepnast at fingið tað fíggjarliga at hingið saman hjá okkum, men hann vónar, at hetta samband einaferð í framtíðini aftur fer at bera til.

– Hetlendingar vóru góðir stuðlar, tá Norrøna bleiv bygd og eisini eftirfylgjandi og vóni eg eisini, at hetta sambandið kann gerast veruleiki aftur - at finnast kann eitt konsept, sum fíggjarliga ber til. Eg havi skilt, at trupult er at kappast hjá t.d. Atlantic Airways við onnur flogfeløg, ið flúgva upp á Hetland m.a. tí hesi verða stuðla- umvegis eitt sokallað "Air Discount Scheme" ið ger tað møguligt at flúgva fyri væl lægri prísir, men tað kanska eg fái greitt meira frá, tá eg hitti Sandy Cluness mikudagin, fyri at vita, hvussu hendan skipan virkar.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, sum í fjør legði upp til størri samstarv við grannan fyri norðan, Grønland, vónar, at vit eisini kunnu fáa eitt størri samstarv við grannan fyri sunnan, Hetland.

– Eg vóni, at vitjanin, sum er hesa vikuna, fer at viðvirka til tættari samstarv millum hesi bæði oyggjasamfeløgini, og eg síggi fram til at hitta Sandy Cluness við fylgi mikudagin.

jan@sosialurin.fo

